Ú T S K R I F T

ú r

gerðabók landsstýrisins

Ár 1963, 7. januar kl. 15 var fundur settur í landsstýrinum. Á fundi vóru Hákun Djurhuus, løgmaður, og landsstýrismenninir Karsten Hoydal, Erlendur Patursson og N. Winther Poulsen.

Løgmaður bar fram ynski um gott og loyalt samarbeiði í landsstýrinum til frama fyri okkara fólk og land. Hann vísti á, at tann tjóðskaparliga hugsanin høvði ført til hesa landsstýrissamgongu.

Til viðgerðar:

1. Býti av virkisøkjunum.

Samtykt at býta eftir hesum sjónarmiðum:

Løgmaður:
Fyrisitingarmál
Heilsumál
Socialmál
Samferðslumál.

Karsten Hoydal:
Handils- og ídnaðarmál
Landbúnaðarmál
Arbeiðaraviðurskiftir

Erlendur Patursson:
Fíggjarmál
Fiskivinnumál
Løgreglumál

N. Winther Poulsen:
Kommunal mál
Skúlamál
Kirkjumál
Mentunnarmál.

Síðani vóru listarnir A og B í heimastýrislógini gjøgnumgingnir.

Endaligt býti varð útsett til seinni fund.

2. Størv landsstýrismanna.

Løgmaður bað um yvirlit yvir, hvørjá størv landsstýrismenninir høvdu, jbr. § 3 í løgtingslóg nr. 5, 14. maj 1948.

3. Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1963/64.

Samtykt at fara undir nýtt uppskot.

4. Fundardagur:

Samtykt at hava fastan fundardag hvønn hósdag kl. 10.

Fundur lokin kl. 16.

Hákun Djurhuus (sign.)
Erlendur Patursson (sign.) N. Winther Poulsen (sign.) / J. Djurhuus (sign.)

Ú T S K R I F T

ú r

gerðabók landsstýrisins

Ár 1963, 10. januar kl. 10, var fundur í landsstýrinum. Á fundi vóru løgmaður, Erlendur Patursson, Karsten Hoydal og Niels Winther Poulsen.

Til viðgerðar:

1. Býti av virkisøkjum millum limirnar í landsstýrinum.

Samtykt at býta málsøkini eftir heimastýrislógini lista A og B soleiðis:

Løgmaður:

listi A: nr. 1, nr. 4, nr. 5, undantikið arbeiðarar, arbeiðaraviðurskiftir, lærudreingir, hjálparmenn, frítíð, nr. 8 og nr.12.

Erlendur Patursson:

listi A: nr. 6, nr. 7, undir nr. 13 - fiskiskapur og friðan av fiski á territoriinum - nr. 14, nr. 16, á lista B: nr. 2, undir nr. 3 - loftferðsla.

Karsten Hoydal:

listi A: undir 5 arbeiðarar, arbeiðaraviðurskiftir, lærudreingir, hjálparmenn, frítíð, nr. 13, javnber undantak frammanfyri, nr. 15, á lista B: undir nr. 3 - ráevni í undirgrundini, nr. 4, nr. 5.

Niels Winther Poulsen:

listi A: nr. 2, nr. 3, nr. 9, nr. 10, nr. 11, á lista B: nr. 1, undir nr. 3 - radio.